# Tunnusláttur og dansur



Aftaná tunnuslátturin skipaði Karl Martin Samuelsen fyri diskoteki til mikla gleði fyri tey yvir 100 fólkini, sum vóru savnað í Skálanum




**Mánadagin hittust øll tey vardu verkstøðini í landinum í Skálanum í Klaksvík til hugnaløtu við tunnuslættri og diskoteki**

TUNNUSLÁTTUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Yvir 100 fólk frá teimum flestu vardu verkstøðunum í landinum vóru savnað til hugnaliga samveru í Skálanum mánadagin. Tað gera vardu verkstøðini vanliga á hvørjum ári, og í ár varð tað so hildið í Klaksvík. Tó vóru tey á verkstaðnum Virkni og tey úr Suðuroy ikki við, tí tað er ov langt og ov trupult hjá teimum at ferðast.

Gestirnir komu niðan í Skálan um tólvtíðina. Har fingu tey pylsur og pastasalat, áðrenn sjálvur tunnuslátturin byrjaði. Øll vóru fegin um at síggjast aftur, og tey prátaðu og hugnaðu sær, meðan tey ótu.

Tað gekk lívliga fyri seg, tá tunnuslátturin fór í gongd. Tað bleiv rópt og heppað á øll, so hvørt sum tey góvu tunnuni eitt slag. Og hvørja ferð okkurt datt niður av henni, ljóðaði tað næstan sum um, at kattakongurin var funnin. Ta einu ferðina, tá ein maður hevði langað til, duttu eitt ótal av smáum bommpakkum undan tunnuni, og eftir hetta fingu tey sær ein bommpakka hvørja ferð tey høvdu sligið. Seiga tunnan, sum fekk av at vita, fór tó mest sum heil í gólvið, tá ið Símun Petur úr Klaksvík gav henni tvey sløg, so tað rungaði í. Og so var kattakongurin funnin.

– Tað er snýt, tí hann bleiv eisini kattakongur í fjør, søgdu fleiri, men tað sást væl, at tað var ikki illa meint, og at tey unnaðu kattakonginum tað væl. Tey flokkaðust um hann beinanvegin, og Jóna, leiðarin á verkstaðnum á Brekku, handaði honum góðgæti, heiðursbræv og sjálva krúnuna.

Karl Martin Samuelsen var komin í Skálan, tí hann skuldi standa fyri tónleikinum til diskotekið. Og so skjótt sum tónleikurin byrjaði fyltist gólvið við fróum fólkum, sum dansaðu allatíðina. Har vóru sangir heilt frá rundferðini hjá HB til Emma´s Blues Band, og gólvið var fult allatíðina.

Tað var sera stuttligt at síggja, hvussu væl øll dugdu at hugna sær. Eisini at síggja, hvussu avbera glað tey eru, tá eitthvørt tiltak er fyri tey.

– Tey eru so erlig teirra útrykki, sigur Jóna Olsen, leiðari á verkstaðnum á Brekku. Hon letur væl at tiltakinum og sigur, at soleiðis hevur tað verið hvørja ferð. Tunnuslátturin er ein siður hjá verkstøðunum, og verður hann aftur á skránni í 2004.



Jacobina var væl fyri, og tunnan fekk av at vita, hvørja ferð hon slóð



Súsanna ætlaði so avgjørt at gerast kattakongur. Og tað kundi tað sama verðið hon, tí hon stóð beint aftan fyri sjálvan kattakongin. – Hann gjørdi tað bara, tí hann visti, at eg stóð aftanfyri, segði hon skemtandi aftaná



Símun Petur Zachariassen gjørdist kattakongur, og her handar grýluklædda Jóna Olsen honum heiðursbræv, góðgæti og krúnuna



# Rúni Hentze spyr um veiðiloyvir

**- Fyri stuttum vórðu tveir partrolarar skiftir út við tveir størri innfluttar bátar. Fyri at javna munin á veiðiorkuni hjá gamla og nýggja parinum verður veiðiloyvi hjá lemmatrolara, sum er lagdur med alla fyri 4 –5 árum síðani, innroknað. Løgtingsmaðurin, Rúni Hentze, vil hava at vita frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, um henda framferð er sambært lógini um vinnuligan fiskiskap**

VEIÐILOYVIR
*Vilmund Jacobsen*



*Løgtingsmaðurin, Rúni Hentze, hevur sett landsstýrismanninum í fiskivinnumálum ein skrivligan fyrispurning um veiðiloyvir. Hann spyr, um lógin loyvir at leggja veiðiloyvir hjá partrolarum og lemmatrolarum saman, og hvør mannagongdin er í slíkum føri.*

Løgtingsmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Sandoynni, Rúni Hentze, hevur sett landsstýrismanninum í fiskivinnumálum skrivligan fyrispurning um veiðiloyvir.

Fyrispurningurin varð settur,11. februar, og eri ikki svaraður enn.

Rúni vil í fyrsta lagi hava at vita, um heimildir eru í lógini at leggja veiðiloyvir hjá partrolara og lemmatrolara saman, og hvør mannagongdin fyri slíkari samanlegging. Hann spyr eisini eftir hvørjum reglum, veiðiorkan hjá partrolara og lemmatrolara verður roknað út.

Í fjórða lagi spyr Rúni, hvør heimildin er fyri hesum reglum, tá ið kunngerðin um, hvussu veiðiorkan verður roknað út, enn ikki er gjørd.

At enda vil løgtingsmaðurin hava at vita, hvussu leingi eftir, at eitt fiskifar er lagt med alla, landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita tilsøgn um veiðiloyvi til annað skip í staðin, sum síðan skal verða skrásett innan 2 ár eftir, at tilsøgnin er givin.

### Eingin kunngerð

Í viðmerkingum sínum, vísir Rúni til lógina um vinnuligan fiskiskap, § 8. Her stendur, at loyvt er at flyta veiðiloyvi frá einum fiskifari, sum er lagt med alla, yvir á innflutt fiskifar við minni ella somu orku.

- Í stk. 3 stendur, at veiðiloyvi frá tveimum fiskiførum, ið eru løgd med alla, kunnu verða flutt yvir á annað far svarandi til, at fiskiorkan ikki verður størri enn fiskiorkan tilsamans hjá fiskiførunum, sum veiðiloyvini verða flutt frá. Í stk. 4 stendur, at verður fiskifar lagt med alla, kann eigarin fáa tilsøgn um veiðiloyvi til annað far í staðin innan 2 ár frá tí degi, tilsøgnin er givin.

Løgtingsmaðurin vísir eisini til stk. 7 í lógini, har sagt verður, at landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um, hvussu fiskiorka verður roknað út og um mannagond fyri samanlegging.

- Men henda kunngerð er ongantíð gjørd, sigur hann.

At enda vísir Rúni til § 5 í lógini, stk. 12. Her stendur, at fiskifør kunnu ikki skifta høvuðsbólk.

### Undarlig javning

- Fyri stuttum vórðu tveir partrolarar skiftir út við tveir størri innfluttar bátar. Fyri at javna munin á veiðiorkuni hjá gamla og nýggja parinum verður veiðiloyvi hjá lemmatrolara, sum er lagdur med alla fyri 4 –5 árum síðani, innroknað, sigur løgtingsmaðurin.

Løgtingið samtykti, 12. februar, at fyrispurningurin skal svarast.

Tá ið fyrispurningurin varð reistur, var Anfinn Kallsberg virkandi fiskimálaráðharri. Síðan er Jacob Vestergaard komin í hansara stað, og tí verður tað hann, ið fer at svara løgtingsmanninum.

# Útlendskur kapitalur í vinnuni

**Kjakfundur var á Strondum mánakvøldið um útlendskan kapital í føroyskari vinnu**

FUNDARTILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Mánakvøldið skipaði sambandsfelagið í Eysturoy, Samhald, fyri kjakfundi í Stranda Centrum á Strondum. Evnið var útlendskur kapitalur í vinnuni teir, sum sótu við pallborðið, vóru løgtingsmenninir, Kaj Leo Johannesen og Heini O. Heinesen.

Eini 40 fólk nýttu høvið at líða á, hvat hesir báðir, sum hava stóran áhuga í vinnuni, høvdu at siga.

Heini var fyrstur við síni framløgu og síðan Kaj Leo. Eftir framløgurnar, høvdu áhoyrararnir høvi at seta spurningar.

Ein eldri maður, sum var millum áhoyrararnar, segði eftir fundin, at hann hevði ikki vitað, hvør var sambandsmaður, og hvør var tjóðveldismaður, um hann ikki visti tað frammanundan.

### Politiskir karmar

- Eg haldi, vit vóru samdir um, at flestu lond leita eftir kapitali og royna at fáa útlendingar at gera íløgur. Kortini er tað soleiðis, at tá ið einum landi ikki vantar kapital, hava vit hug at steingja fyri - og øvut, tá ið tørvur er á kapitali.

Kaj Leo sigur, at skulu vit loyva útlendskum kapitali, er neyðugt, at politisku karmarnir eru teir røttu, og at stabilitetur er í samfelagnum.

- Eg haldi, vit vóru rættiliga samdir um, at neyðugt er við eini betri lóggávu á økinum, um vit skulu lata upp fyri útlendskum kapitali í føroyskari vinnu. Her gongur sjón fyri søgn, sigur Kaj Leo.

Hann ásannar, at spurningurin um fiskiríkidømi í føroyskum sjógvi er kensluborin, og tí eiga vit at ansa væl eftir, hvussu fram verður farið.

- Vit vóru samdir um, at lóggávan fyri útlendskum kapitali í føroyskari vinnu er ikki nøktandi.

### Ávísur ótti

Kaj Leo sigur, at hann tosaði um globalisering og vísti á, at øll lond hava ein ávísan ótta fyri tí útlendska og fremmanda.

- Eg legði dent á, at vegurin til framburð er útbúgving og kapitalur, sigur Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður.

Sosialurin fer at venda aftur til fundin á Strondum

# Svartkjaftur og lodn á Havsbrún

**Krúnborg og Tróndur í Gøtu høvdu 2500 tons av lodnu í part undan Íslandi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Trý skip hava landað til Havsbrún fyrst í hesi vikuni.

Írski báturin, Western Endowour, sum er úr Dublin, hevði 2300 tons av svartkjafti, sum teir fingu vestanfyri Írland.

Jákup Oluf Joensen á Havsbrún sigur, at írski báturin hevði tvey samdøgur av fiskileið til Føroya.

### Lodna úr Íslandi

Týsmorgunin lá Krúnborg og landaði á Havsbrún. Teir høvdu 2500 tons av lodnu undan Íslandi.

Síðstu nátt kom Tróndur í Gøtu, eisini undan Íslandi, og eisini við 2500 tonsum av lodnu.

Jákup Oluf Joensen sigur, at skipini hava fingið lodnuna vestanfyri Vestmannaoyggjarnar, vestur ímóti Grindavíkini.

Hann væntar ikki, at fleiri føroyskar landingar verða hesa vikuna, men kanska leggur onkur útlendskur bátur leiðina hendanvegin.



Krúnborg landaði 2500 tons av lodnu í Fuglafirði týsmorgunin